

# Koppseting fyri COVID-19 – Støðulýsing II

COVID-19 koppsetingarbólkurin

26. mars 2021

# Innihaldsyvirlit

Samandráttur ........ 3
Koppingarevnir og vørusendingar ........ 4
Koppsetingargongdin ........ 6
Koppsett higartil ........ 9
Undirtøka ........ 11
Føroyar samanborið við onnur lond ........ 12
Gagnnýtsla av koppingarevni ........ 13
Kunningartilfar ........ 14

# Samandráttur

Í Føroyum varð farið undir at koppseta fyri COVID-19 tann 30. januar 2021. Tann 24. mars høvdu tilsamans 9.427 fólk tikið av tilboðnum um koppseting. Av hesum hava 5.388 fólk fingið fyrru koppsetingina og 4.039 fólk hava fingið seinnu koppsetingina, og eru sostatt liðugt koppsett.

Í hesi støðulýsingini verður tikið samanum koppsetingargongdina higartil og løgd verða fram hagtøl, sum lýsa gongdina í tíðarskeiðinum frá 30. desember 2020 til 24. mars 2021. Hetta er onnur støðulýsingin. Fyrsta støðulýsingin varð gjørd 19. februar 2021. COVID-19 koppsetingarbólkurin fer at dagføra støðulýsingina regluliga komandi mánaðirnar.

Koppsetingin av bólki 5 í koppsetingarætlanini (fólk, sum hava fylt 65 ár og fáa røkt og hjálp) er komin væl áleiðis. Nú er farið undir at koppseta eftir aldri, og byrja er við teimum, sum eru 85 ár og eldri. Í hesum sambandi, er nýggj bíleggingarskipan tikin í nýtslu.

Ávís óvissa hevur verið um veitingarnar av koppingarevni. Talan er tó í stóran mun um seinkingar í sendingunum. Hetta hevur havt við sær, at koppsetingarkalendarin aftur varð tillagaður eitt vet herfyri. Í løtuni er sera trupult at siga, nær øll í Føroyum, sum koppingarevni er góðkent til, hava fingið í boðið koppsetingina. Ein varislig meting er, at øll hesi eru koppsett um hálvan juli 2021.

Samanumtikið hevur tað gingið sera væl við koppsetingini í Føroyum, hóast nakrar snávingarsteinar í byrjanini av koppsetingargongdini. Koppsetingin hevur gingið skjótt, undirtøkan hevur verið sera góð og gagnnýtslan av koppingarevni hevur verið høg.

# Koppingarevnir og vørusendingar

### *Góðkend koppingarevnir*

Føroyar fáa koppingarevnir úr Danmark. Í løtuni eru trý sløg av koppingarevnum góðkend í Danmark. Roknað verður við, at fleiri sløg av koppingarevnum fara at verða góðkend komandi mánaðarnar. Á heimasíðunum hjá Sundhedsstyrelsen (www.sst.dk) og Lægemiddelstyrelsen (www.lmst.dk) ber til at lesa meira um koppingarevnini og hvussu tey verða góðkend at brúka til koppsetingar.

*Mynd 1: Koppingarevnir*

| | | |
|---|---|---|
| **Comirnaty®** | Týska fyritøkan BioNTech hevur ment hetta koppingarevnið, sum verður framleitt og marknaðarført í samstarvi við amerikonsku fyritøkuna Pfizer. Koppingarevnið til marknaðin í Evropa verður framleitt og sent frá Pfizer í Belgia. Koppingarevnið verður veitt tvær ferðir við 21 daga millumbili og í undantaksførum innan fyri 42 dagar. | **Góðkent 21.12.2020**<br>Fyrsta vørusending kom til Statens Serum Institut 26.12.2020.<br><br>Koppingarevnið kom til Føroyar 27.12.2020. |
| Tøkni | Messenger RNA (mRNA) | |
| **COVID-19 Vaccine Moderna®** | Amerikanska fyritøkan Moderna hevur ment koppingarevnið saman við US National Institute of Allergy and Infectious Diseases. Koppingarevnið til marknaðin í Evropa verður framleitt í Sveis og Spania eftir avtalu við sveisisku fyritøkuna Lonza Group. Koppingarevnið verður veitt tvær ferðir við 28 daga millumbili og í undantaksførum innan fyri 43 dagar. | **Góðkent 6.01.2021**<br>Fyrsta vørusending kom til Statens Serum Institut 12.01.2021.<br><br>Hetta koppingarevnið fæst ikki í Føroyum enn. |
| Tøkni | Messenger RNA (mRNA) | |
| **COVID-19 Vaccine AstraZeneca®** | Bretsk-svenska fyritøkan Astra Zeneca hevur ment koppingarevnið í samstarvi við Oxford University. Koppingarevnið verður veitt tvær ferðir við 28 daga millumbili og í undantaksførum innan fyri 84 dagar. | **Góðkent 29.01.2021**<br>Fyrsta vørusending kom til Statens Serum Institut 6.02.2021.<br><br>Hetta koppingarevnið fæst ikki í Føroyum enn. |
| Tøkni | Ikki-replikerendi virusvektor | |

### *Vørusendingar*

Koppingarevnini, sum Danmark fær, verða latin Statens Serum Institut, sum síðani sendur tey til ávikavist Føroyar, Grønlands og donsku regiónirnar. Tá koppingarevnini koma til Føroyar, verða tey latin Apoteksverkinum, sum hevur tey í varðveitslu til tey verða brúkt at koppseta fólk í Føroyum.

Í mynd 2 sæst, hvussu nógv koppingarevni Føroyar hava fingið/fara at fáa í tíðarskeiðinum vika 53 í 2020 – vika 12 í 2021. Í viku 12 fæst at vita, hvussu nógv koppingarevni fara at koma til Føroyar komandi tvær vikurnar.

*Mynd 2: Vørusendingar við koppingarevninum Comirnaty®*

| | Desember | Januar | Februar | Mars |
|---|---|---|---|---|
| Tal av bakkum | 1 | 2 | 2 | 2 |

Í hvørjum bakka eru 195 gløs. Pfizer BioNTech kunnaði upprunaliga um, at tað bar til at fáa fimm skamtar av koppingarevninum úr hvørjum glasi. T.v.s., at í hvørjum bakka var nokk av skamtum til at koppseta 975 persónar. Pfizer BioNTech hevur síðani boðað frá, at tað ber til at fáa seks skamtar av koppingarevninum úr hvørjum glasi. Royndirnar hava víst, at tað hevur eydnast Sjúkrahúsverkinum í Føroyum at fáa upp í sjey skamtar av koppingarevninum úr nærum hvørjum glasi. T.v.s., at tað ber til at koppseta fleiri enn 1.300 persónar pr. bakka. Les nærri undir "Gagnnýtsla av koppingarevni".

### *Grundarlagið fyri tíðarætlanini*

Grundarlagið fyri tíðarætlanini í koppsetingarkalendaranum eru tær fráboðanir, sum heilivágsfyritøkurnar koma við um tal á skamtum og vørusendingum, sum tær lata til Evropa, og herundir til Danmarkar og Føroyar. Síðani farið var undir at koppseta hava heilivágsfyritøkurnar havt ymsar fráboðanir um, hvussu nógvar skamtar tær kunnu framleiða bæði í løtuni og sum fráliður.

Tann 11. mars 2021 valdi Sundhedsstyrelsen at steðga við at brúka koppingarevni frá AstraZeneca fyribils; og 25. mars var hesin støðgur longdur við trimum vikum til viku 15. Føroyar hava ikki fingið koppingarevni frá AstraZeneca. Men av tí, at koppingarevni, sum koma til Danmarkar verða býtt millum Føroyar, Grønland og donsku regiónirnar eftir fólkatali, kann hetta møguliga koma at ávirka, hvussu nógvar skamtir Føroyar fær næstu tíðina. Í løtuni ber tó ikki til at siga, hvørja ávirkan avgerðin hjá Sundhedsstyrelsen um fyribils at steðga við at brúka koppingarevni frá AstraZeneca kann fara at fáa fyri vørusendingarnar við koppingarevnum til Føroyar.

Danska Sundhedsstyrelsen ger javnan nýggjar forsagnir fyri komandi sendingar av koppingarevni. Sum longu nevnt fáa Føroyar burturav sendingunum til Danmarkar og tí kunnu vit vænta, at føroyska tíðarætlan fyri koppsetingunum líkist tí donsku.

## Koppsetingargongdin

Øll í Føroyum, sum koppingarevnið er góðkent til, fáa í boðið ókeypis koppseting fyri COVID-19 í ár. Í løtuni vísa metingarnar, at øll, sum taka av tilboðnum, kunnu verða liðugt koppsett um miðjan juli 2021.

Koppingarevnini koma til Føroya í avmarkaðum nøgdum. Hetta merkir, at tað ikki ber til at bjóða øllum føroyingum koppseting fyri COVID-19 í senn. Av somu orsøk hevur verið neyðugt at býta fólk í bólkar. Koppsetingarbólkurin hevur valt at býta føroyingar í 12 málbólkar, sum stigvíst fáa í tilboð um at verða koppsett fyri COVID-19, sí mynd.

*Mynd: Koppsetingarkalendarin – dagførdur 18. mars 2021*



Sambært koppingaræitlanini sær raðfestingin og tíðaræitlanin soleiðis út:

| Vika | Dato | Málbólkur | |
|---|---|---|---|
| 53 - 9 | 30. desember - 7. mars | 1 | Starvsfólk í fremstu røð |
| 2 - 9 | 11. januar - 7. mars | 2 | Búfólk á ellis- og røktarheimum ella øðrum røktarbústaði |
| 3 - 16 | 18. januar - 25. apríl | 3 | Persónar, sum eru í serligum vanda fyri at gerast álvarsliga sjúkir, verða teir smittaðir við Covid-19. Hesir sjúklingar verða valdir út í samráð við teir sjúkrahúslæknar, sum hava ábyrgd av viðgerðini hjá tí einstaka. |
| 4 - 16 | 25. januar - 25. apríl | 4 | Avvarðandi hjá persónum, sum eru í serligum vanda fyri at gerast álvarsliga sjúkir, verða teir smittaðir við Covid-19 (tað eru sjúklingar, sum verða koppsettir í viku 3 - 13) |
| 10 - 17 | 8. mars - 2. mai | 5 | Persónar, ið hava fylt 65 ár, sum fáa persónliga røkt og hjálp við tí praktiska |
| 12 - 19 | 22. mars - 16. mai | 6 | Fólk, sum eru 85 ár og eldri |
| 12 - 20 | 26. mars - 23. mai | 7 | Fólk, sum eru 80 ár og eldri |
| 16 - 22 | 19. apríl - 6. juni | 8 | Fólk, sum eru 75 ár og eldri |
| 17 - 22 | 26. apríl - 6. juni | 9 | Fólk, sum eru 65 ár og eldri |
| 19 - 27 | 10. mai - 11. juli | 10 | Fólk, sum eru yngri enn 65 ár og eru í øktum vanda |
| 19 - 27 | 10. mai - 11. juli | 11 | Fólk, sum samfelagskritisk størv |
| 19 - 27 | 10. mai - 11. juli | 12 | Fólk, sum eru 16 ár og eldri |

Tá koppsetingarkalendarin varð dagførdur 18. mars roknaði koppsetingarbólkurin við, at fólk í bólki 7 fóru at verða koppsett eftir páskir, men hetta er nú framskundað. Tey fyrstu í hesum bólki vórðu koppsett tann 26. mars.

Sambært kunngerðini um ókeypis koppseting fyri COVID-19 hevur Sjúkrahúsverkið ábyrgdina av at skipa fyri og fremja koppsetingarnar. Tað er tí eisini Sjúkrahúsverkið, sum hevur staðið fyri at kalla inn og koppseta fólk í teimum málbólkum, ið nevndir eru í koppingaræitlanini, og sum hava tikið av tilboðnum um koppseting.

Sjúkrahúsverkið hevur sett eitt koppsetingartoymi við starvsfólkum frá øllum trimum sjúkrahúsunum, og øll koppsetingin er samskipað við eins mannagongdum tvørtur um sjúkrahúsini. So hvørt boð koma frá Landsapotekaranum um, at ein sending við koppingarevni er á veg, fáa fólk í teimum raðfestu málbólkunum, bjóðað koppseting. Nógv flest fólk eru koppsett inni á teimum trimum sjúkrahúsunum og harumframt hava flytførar eindir frá sjúkrahúsunum vitja á ellis- og røktarheimum og sambýlum kring landið fyri at koppseta búfólk.

Koppingarevni er komið í avmarkaðum nøgdum og vanliga hevur tað tikið 3-4 dagar at brúka alt koppingarevnið, sum hevur verið til taks. Kapasitetur er tí til at koppseta nógv fleiri enn tað verða í dag.

Ein talgild bíleggingarskipan er ment í sambandi við koppsetingina fyri COVID-19. Hetta merkir, at fólk sjálvi skulu bíleggja sær tíð at verða koppsett. Bíleggingarskipanin er eftir sama leisti, sum tá fólk bíleggja

sær tíð til koronukanning. Í stuttum verður skipanin soleiðis, at tey, ið eiga tørn sambært koppsetingaræltanini, fáa boð gjøgnum miðlarnar um, at tey kunnu bíleggja sær tíð til koppseting. Bíleggingin fer fram á www.korona.fo. Tey sum ikki hava møguleika at bíleggja sær tíð á heimasíðuni ella at fáa hjálp frá avvarðandi, kunnu ringja á telefon 304545 og fáa hjálp. Lýst verður væl og virðiliga alment í sambandi við, at skipanin verður tikin í nýtslu.

## Koppsett higartil

Fyrstu føroyingarnir vórðu koppsettir beint fyri nýggjár, tann 30. desember 2020, og tann 24. mars 2021 vóru tilsamans 9.427 koppsetingar givnar í Føroyum. Í alt 5.388 fólk, svarandi til 10,2 prosent, hava fingið fyrru koppsetingina og 4.039 fólk hava fingið seinnu koppsetingina, og eru sostatt liðugt koppsett. Hetta svarar til 7,6 prosent av fólkatalinum.

*Mynd: Koppsetingar skift á vikur*




Í løtuni eru níggju av hesum málbólkum fevndir av kunngerðini um ókeypis koppseting ímóti COVID-19. Higartil hava fólk í fyrstu seks málbólkunum fingið í boði at verða koppsett. Seinni fer kunngerðin at verða víðka til eisini at fevna um restina av málbólkunum.

Sambært Sjúkrahúsverkinum hava øll í bólkunum 1 til 5 fingið bjóðað koppseting. Í hesi vikuni varð byrjað at koppseta eftir aldursbólkum.

*Mynd: Koppsetingar skift á kyn*



Heilsu- og røktarstarvsfólk eru framvegis ein stórur partur av teimum, sum eru koppsett higartil. Hetta sæst eisini aftur í kynsbýtinum, tí tað eru fleiri kvinnur enn menn í hesum starvsbólkum. Av teimum 9.427 koppsetingunum tilsamans, hava kvinnur fingið 7.347 og menn 2.080 koppsetingar.

Verður hugt eftir aldursbýtinum sæst, at flestu fólk, sum higartil hava tikið av tilboðnum um COVID-19 koppsetingina eru í aldrinum 50-64 ár. Teimum á baki koma fólk í aldrinum 40-49 ár og 64 til 69 ár.

*Mynd: Koppsetingar skift á aldur*



## Undirtøka

Royndirnar higartil vísa, at flest øll, sum hava fingið koppsetingina í boði, hava tikið av. Tey, sum hava borið seg undan, hava havt vanligar orsøkir til tess, so sum sjúku ella, at tey hava verið upptikin av øðrum, men hesi hava so fingið koppsetingina seinni.

Tá koppsetingin stendur almenninginum í boði fæst ein betri mynd av undirtøkuni, men ein spurnarkanning, sum Heilsumálaráðið tók stig til í januar í ár, vísti, at 84 prosent av føroyingum vildu koppsetast. Bara sløk 6 prosent svaraðu, at tey ikki ætla at lata seg koppseta.

*Mynd: Spurnarkanning frá Spyr.fo*



## Føroyar samanborið við onnur lond

Sambært uppgerðini hjá Our World in Data liggja Føroyar rættiliga væl samanborið við heimsins lond. Our World in Data ger upp tølini fyri koppsetingar tilsamans fyri hvørji 100 fólk.

Tann 23. mars vóru 18 fólk í Føroyum koppsett fyri hvørji 100 fólk (sambært Our World in Data er talið 19,18. Hetta kemst av, at Our World in Data hevur sett fólkatalið í Føroyum til 48.865 fólk). Tað eru framvegis londini Gibraltar og Ísrael, sum eru komin longst við koppsetingum. Hesi lond hava hava koppsett ávikavist 160 og 113 fólk fyri hvørji 100 fólk, tað vil siga, øll eru koppsett einaferð. Í Stórabretlandi eru umleið 46 fólk koppsett fyri hvørji 100 fólk, og í USA er talið umleið 38 fólk fyri hvørji 100 fólk. Í talvuni niðanfyri síggjast tølini fyri Norðurlondini.

*Kelda: Our World in Data 23.mars 2021,* https://ourworldindata.org/covid-vaccinations

| Tal av koppsetingum fyri hvørji 100 íbúgvar | |
|---|---|
| Føroyar | 18,00 |
| Danmark | 16,89 |
| Ísland | 16,08 |
| Noreg | 14,46 |
| Finnland | 14,99 |
| Svøríki | 13,72 |

## Gagnnýtsla av koppingarevni

Tað er umráðandi, at so lítið koppingarevni sum gjørligt fer fyri skeyti, serliga tá nøgdin av atkomuligum koppingarevni er so avmarkað, sum hon er nú. Tað er altíð vandi fyri spilli, tá koppsett verður, serliga, tá koppingarevni er viðbrekið og krevur serliga handfaring. At fáa so nógv burturúr hvørjari sending av koppingarevni er tað vit rópa nýtslulutfall.

Í Føroyum hava vit bert koppsett við koppingarevninum Comirnaty frá Pfizer/BioNTech. Vit hava fingið sjey bakkar við 195 gløsum hvørja ferð. Danska Sundhedsstyrelsen metir í dag, at í hvørjum glasi eru 6 skamtir á 0,3 ml., men fyrstu tíðina varð mett at tað vóru 5 skamtir í hvørjum glasi, sum framleiðarin eisini hevði boðað frá.

Tað varð skjótt greitt, at starvsfólkini í Sjúkrahúsverkinum fingu seks og sjey skamtir úr hvørjum glasi. Sum tíðin gekk fingu starvsfólkini nærum hvørjaferð sjey skamtir úr hvørjum glasi av koppingarevni frá Pfizer/BioNTech.

Tað gongur framvegis sera væl at handfara koppingarevni, og mest sum einki koppingarevni fer fyri skeyti. Starvsfólkini í Sjúkrahúsverkinum koppsettu tilsamans 1.354 fólk úr seinastu sendingini frá Pfizer/BioNTech, og tað er á leið sama tal av koppsetingum, sum hevur verið síðani byrjað varð at koppseta. Samanborið við donsku royndirnar við Pfizer-koppingarevninum, so er hetta talið høgt. Nýggjasta støðufrágreiðingin frá danska Sundhedsstyrelsen sigur, at talið í Danmark í miðal er um 1.200 koppsetingar úr hvørjari sending. Tað svarar til, at vit í Føroyum fáa 13 prosent meira koppingarevni úr hvørjari sending frá Pfizer/BioNTech.

Nýtslulutfallið av koppingarevni er 120 prosent í Føroyum, sum samanborið við donsku regiónirnar, er høgt og merkir, at minni av koppingarevni er farið fyri skeytið. Nýtslulutfallið í Danmark er um 104 prosent. Um nýtsluprosentið í Føroyum var sum miðal í Danmark, so høvdu vit gjørt 16 prosent færri koppsetingar, sum svarar til um 850 koppsetingar.

Samanumtikið er mest sum einki koppingarevni fyri koronu farið fyri skeytið. Um sæð verður burtur frá fyrstu sending, so hevur tað eydnast at fingið gott og væl 1.350 skamtir úr hvørjari sending frá Pfizer/NioNTech. Ein av orsøkunum til, at færri skamtir vóru úr fyrstu sending er, at ikki fleiri av serstøku kanylunum frá framleiðaranum vóru eftir og tað vísti seg, at tá fingu starvsfólkini bara seks skamtir úr hvørjum glasi.

### *Restskamtir*

Áðrenn farið var undir at koppseta, var tað hildið at vera sera týdningarmikið at hava ein kunngerð, sum neyvt ásetti, hvør kundi koppsetast. Orsøkin var avmarkaðu nøgdirnar av koppingarevnum. Seinni hevur tað víst seg, at henda skipanin var ov stirvin, tí hon tók ikki atlit til, hvat skuldi gerast við møguligar avlopsskamtir. T.v.s. kundu teir brúkast ella skuldu teir koyrast burtur. Gjørt varð av at brúka avlopsskamirnar, heldur enn at burturbeina teimum. Av somu orsøk eru eingir skamtir burturbeindir; men mikil orrusta stóðst av avgerðini. Kunngerðin er nú broytt, so Sjúkrahúsverkið kann koppseta onnur enn tey, sum eru nevnd í kunngerðini, um so er, at skamtur loypur av tann dag koppsett verður. Sjúkrahúsverkið hevur gjørt leiðreglur um at koppseta við avlopsskamtum.

## Kunningartilfar

Kunningartilfar verður framhaldandi framleitt og lagt á corona.fo, undir koppseting:
https://corona.fo/203?_l=fo.

| | |
|---|---|
| Koppseting fyri COVID-19 - Støðulýsing | 26. mars 2021 |
| Koppseting fyri COCID-19 - Støðulýsing | 19. februar 2021 |
| Koppsetingarkalendarin | Dagførdur 18. mars 2021 |
| Kunninga um koronukoppseting | Filmur: Nú fáa fólk 85 ár og eldri tilboð um koppseting |
| Kunning um koronukoppseting | Filmur um hvørjir bólkar fáa bjóðað koppseting fyrst |
| Koppseting fyri COVID-19 | Faldari til tey, ið verða koppsett |
| COVID-19 Koppingarætlan fyri Føroyar | Fyrsti partur av koppingarætlanini - Heilsumálaráðið, desember 2020 |
| **Tíðindaskriv:** | Nýggj bíleggingarskipan til koppseting<br>Fólk við fjølbreki verða koppsett næst<br>Støðulýsing av koppsetingargongdini<br>Annað prikið framskundað<br>Landsstýrismaðurin fult álit á koppseting<br>84 prosent av føroyingum vilja koppsetast<br>Eldri og heilsuveik næst í røðini<br>Við koppsetingini hómast endin á koronufarsóttini<br>Vaksinan er á veg<br>Koppseting byrjar nakrar dagar seinni enn ætlað<br>Koppsetingin byrjar ímillum jóla og nýggjárs<br>Koppingarætlanin handað landsstýrismanninum |